# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*- Hillary Clinton hóttir við at leggja Iran í oyði, um landið ger seg inn á Ísrael. Hetta minnir um Bush*

*(Barrack Obama)*

# 30.000 ikki komin afturíaftur

**Talið á deyðum eftir melduródnina í Burma veksur støðugt og er nú farið upp um 15.000. Harumframt eru 30.000 onnur ikki komin afturíaftur**



*30.000 fólk eru ikki komin afturíaftur, og tí kann talið á deyðum blíva nógv størri*

*(Mynd: Polfoto)*

Hernaðarstýrið í Burma viðgongur nú, at meldurødnin Nargis hevur gjørt nógv størri skaða, enn myndugleikarnir søgdu av fyrstan tíð. Nyan Win, uttanríkisráðharri, segði við almennu kinesisku tíðindastovuna Xinhua í morgun, at talið á deyðum liggur um 15.000. Samstundis visti almenna kringvarpið at siga, at bara í býnum Bogalay við Irrawaddy-ánna viðskeiðis í landinum hava umleið 10.000 fólk latið lív.

Teilendskumyndugleikarnir siga seg hava fingið at vita, at minst 30.000 fólk eru ikki komin afturíaftur. Tað sigur Noppadol Pattama, uttanríkisráðharri, við Sky News.

Nyan Win sigur við Xinhua, at tað er lítið at ivast í, at talið á deyðum fer at veksa, so hvørt sum bjargingarliðini fáa samband við tey ringast raktu økini í Irrawaddy-ósanum. Umleið 3,5 milliónir fólk búgva í smáum býum og bygdum við ósan, og har eru nógvar oyggjar, sum myndugleikarnir ikki hava havt samband við enn.

**Kann fáa avleiðingar**

Eygleiðarar vísa samstundis á, at tað kann fáa sera álvarsamar avleiðingar fyri Burma, at júst økið við Irrawaddy-ósan er so meint rakt, tí ósin verður vanliga roknaður sum tann týdningarmesti rísakurin í øllum Asia. Tí kann tað fáa stórar avleiðingar, um tað vísir seg, at akrarnir eru oyðilagdir.

Tá flóðaldan skolaði inn yvir Burma á jólum í 2004, vildi hernaðarstýrið ikki hava altjóða hjálp, men hesaferð hevur stýrið játtað at taka ímóti hjálp uttaneftir. Samstundis eru myndugleikarnir fyri hvøssum atfinningum, tí teir ikki ávaraðu fólk um, at meldurødnin var á veg, og tí teir vóru ov seinir at senda hermenn at hjálpa neyðstøddum, tá ódnarveðrið hasaði av.

Sky News sigur, at í høvuðsstaðnum Yangon standa fólk í bíðiraðum at keypa sær vatn at drekka, og hóast fýra dagar eru farnir síðani ódnina, hevur høvuðsstaðurin ikki fingið streymin aftur enn.

## STUTT SAGT

### Saddam ræddist eyðkvæmi



*Saddam Hussein skrivaði nógv í varðhaldinum*

*(Mynd: Polfoto)*

Fyrrverandi irakski forsetin Saddam Hussein var bangin fyri, at hansara amerikonsku fangavørðar skuldu smitta seg við eyðkvæmi ella øðrum kynssjúkum. Tað sæst í brøvum, sum Saddam skrivaði, meðan hann sat í amerikonskum varðhaldi, og sum arabiska blaðið Al-Hayat prentaði í gjár. Amerikanska herleiðslan í Irak váttaði í gjár, at hon hevur latið fjølmiðlunum sumt av tí, sum Saddam Hussein skrivaði, meðan hann sat í varðhaldinum. Sambært talsmanninum hjá herleiðsluni skrivaði gamli forsetin fleiri túsund síður. Amerikanararnir tóku Saddam Hussein í desembur í 2003. Trý ár seinni varð hann dømdur til deyða fyri brotsverk ímóti mannaættini og hongdur.

### Atkvøða um navn

Grikkaland vil ikki lata grannalandið Makedonia fáa limaskap í NATO, uttan at landið fær sær eitt annað navn, tí tann norðari parturin av Grikkalandi eitureisini Makedonia. Grikkar vilja vera við, at makedonar ætlar sær at krevja ræðisrættin í grikska landspartinum seinni. Nú hevur makedonski forsætisráðharrin, Nikola Gruevski, skotið upp, at makedonar skulu á fólkaatkvøðu at siga frá, um teir eru sinnaðir at broyta landsnavnið, ella um landið skal sleppa ætlanini um at fara upp í NATO. Stjórnarflokkurin er ímóti at slaka fyri grikkum, men andstøðuflokkarnir lata dyrnar standa á gloppi fyri einari navnabroyting, skrivar AP.

# Bertie av brúnni

**Írski forsætisráðharrin, Bertie Ahern, telist millum teirra, sum hava sitið leingi við róðrið, men í dag fer hann frá**

Tað kom óvart á tey flestu, tá Bertie Ahern í síðsta mánað boðaði frá, at hann hevði gjørt av at siga forsætisráðharrasessin frá sær. Grundgevingin var, at hann er lagdur undir ymiskt fíggjarligt óreglusemi, og hóast hann sigur seg vera ósekan, ávirkar málið tað politiska arbeiðið meiri, enn gott er, og tí helt hann tað vera best at lata onkran annan taka við.

Eftirmaður hjá Bertie Ahern verður Brian Cowen, fíggjarmálaráðharri. Hansara fyrsta uppgáva verður at fáa írar at taka undir við Lissabonsáttmálanum hjá ES, tá fólkaatkvøða verður um spurningin tann 12. juni.

Írland er tað einasta av ES-londunum, sum heldur fólkaatkvøðu um tann nýggja sáttmálan.



*Bertie Ahern hevur havt ein virknan lut í arbeiðinum fyri friði í Norðurírlandi*

*Mynd: Polfoto*